## Koyring til og av flogvøllinum

Avtala er gjørd við ABC Shuttle og Hammer Shuttle um koyring til og av flogvøllinum. Avtalan er fyri sjúklingar og avvarðandi, sum sjúkrahúsverkið hevur játtað sum fylgjara.
Fólk verða heintað á teirra bústaði. Heintað verður ikki í Suðuroy, Sandoy og Vágunum, men sjúklingar frá hesum støðum kunnu verða heintað ávikavist í Tórshavn og á Gomlu rætt. Umframt hetta eru nøkur savningarstøð fyri ávísar bygdir, sum liggja avsíðis.
Savningarstøðini eru:
Gamla Rætt: Ferðandi úr Sandoy
Tórshavn: Ferðandi úr Suðuroy
Kaldbaksbotnur: Kaldbak
Kvívík/Leynar: Vestmanna
Skálabotnur: Bygdirnar á Vestara armi, Oyndarfjørður, Hellurnar
Funningsfjørður: Elduvík, Funningur, Gjógv
Við Streymin (Magnstøðin): Eiði, Ljósá, Tjørnuvík, Haldarsvík
Fyri at brúka hesa tænastu verður tú spurdur av sjúkrahúsverkinum um hetta. Síðani fært tú ein ”vouchara” frá sjúkrahúsverkinum, sum bert kann nýtast til ásettu ferðina.
Neyðugt er at bíleggja pláss í minsta lagi 4 tímar innan fráferð og komu. Ferðin kann í seinasta lagi avlýsast 4 tímar áðrenn. Tú hevur sjálv/ur ábyrgd av at bíleggja flutning, og kann hetta gerast við at senda sms ella um teldupost/heimasíðu:
Suðurøkið: ABC Shuttle, tel. 580580/282800 T– postur: danielsendanny@gmail.com
Norðurøkið: Hammer shuttle, tel. 732000 T-postur hanseiler@olivant.fo www.hammershuttle.com Bíleggjast skal innan kl. 22.00 á kvøldi.
Óbrúktir voucharar skulu latast sjúkrahúsinum aftur.